# GERÐABÓK

**Dato:** **30. januar 2014** **kl. 17.00**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 01/14-24/14**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Jógvan Arge
Elin Lindenskov
Helena Dam á Neystabø
Sigrún Mohr
Tróndur Sigurdsson
Rúni Djurhuus
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Sjúrður Olsen
Jákup Dam
Marin Katrina Frýdal
Bjørghild Djurhuus

**LUTTÓKU IKKI:**
Halla Samuelsen

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

**08/14** **2014-0278**

**Halla Samuelsen hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Rúni Djurhuus, eru loknar.

**Býráðið 30. januar 2014:** Samtykt.

**09/14** **2014-0136**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 30. januar 2014:** Tikið til eftirtektar.

**10/14** **2013-0143**

**Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2013**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2013 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. februar 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 21. februar 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2013 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 21. mars 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri mars 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri apríl 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 30. mai 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri mai 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 26. juni 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri juni og juli 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 16. september 2013:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri august og september 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 31. oktober 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri oktober 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 4. desember 2013:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 12. desember 2013:** Framlagt og einmælt góðkent.

Roknskapurin fyri november 2013 verður lagdur fram.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðið 30. januar 2014:** Framlagt og einmælt góðkent.

**11/14** **2013-2551**

**Bústaðarskylda á Reyni**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Nevndarlimur hevur biðið um at fáa málið á skrá.

Málið er ikki viðgjørt av umsitingini.

**Tekniska nevnd 24. oktober 2013:** Nevndin samtykti at beina málið í umsitingina at kanna løgfrøðilig viðurskifti í sambandi við møguleikarnar at krevja bústaðarskyldu úti á Reyni og í miðbýnum, at leggja fyri nevndina aftur. Somuleiðis verður heitt á fíggjarnevndina um at seta bústaðarskyldu á hús, sum kommunan sjálv selir í miðbýnum. Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini.

**Ískoyti:**
Løgfrøðisligt notat j.nr. 2013-2551/2 verður framlagt á fundinum.

**Tekniska nevnd 28. november 2013:** Útsett.

**Tekniska nevnd 9. desember 2013:** Ein meiriluti í nevndini, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Helena Dam á Neystabø og Marin Katrina Frýdal, mælir býráðnum til at heita á landsstýrið um at útvega kommununum lógarheimild at seta krav um bústaðarskyldu, vísandi til løgfrøðisliga notatið, har staðfest verður vantandi heimild til at krevja bústaðarskyldu.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 30. januar 2014:** Útsett við atliti til nærri kanningar.

**Býráðið 30. januar 2014:** Tikið av skrá.

**12/14** **2013-2279 FNJ**

**Jens Kjeld Jensen: Áheitan um grannastevnulóg í Nólsoy**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Jens Kjeld Jensen (JKJ) hevur vent sær til Tórshavnar kommunu viðv. kettum í Nólsoy, sum eru ein hóttan ímóti Drunnhvítastovninum í Nólsoy.
Sambært lóg um grannastevnu frá 18.05.1937, skal ein sak fráboðast sýslumanninum áðrenn 1. november ári frammanundan fundin, ið verður hildin í januar/februar.

JKJ fer á grannastevnu at leggja fram fylgjandi uppskot:

**Grannastevnuuppskot, sent til sýslumannin oktober 2013**

Sambært tí nýggja føroyska ringmerkingaratlassinum verða heili 27% av fráboðaðu ringmerktu drunnhvítunum dripnir av kettu. Hjá gráspurvunum er talið 19% og heili 50% fyri ein flytifugl, sum til dømis munkin.
Toxoplasmosa (*Toxoplasma gondii*), sum er einkyknað snultidýr, heldur til í vilunum hjá kettu. Sjúkan smittar við skarninum hjá kettu. Ær sum fáa smittuna í seg, kunnu lambsskjótast nakað fyri lembing, ella tær kunnu lemba deyð ella veik lomb.
Nú Nólsoy er vorðið eitt Ramsar øki, eiga vit at ansa væl eftir tí. Vit mugu fáa eitt yvirlit yvir spøku ketturnar í Nólsoy, so vit kunnu fáa tamarhald á støðuni við villkettum í oynni. Tí leggi eg fram hetta uppskot:

1. Kunngerðin fra 1. februar 1995 viðvíkjandi hald av kettu í Nólsoy eigur at verða strikað.
2. Kunngerðin um "Ikki er loyvt at halda dúgvum í fangilsi í Nólsoy" verður ikki viðgjørd her, tí skal kunngerðin enn vera galdandi.
3. Tað, ið stendur skrivað niðriundir, verður lagt fram sum nýggj grannastevnukunngerð for Nólsoy.

---

§ 1. Allar kettur í Nólsoy skulu vera kippmerktar, og tað er eigarans ábyrgd at syrgja fyri, at navnið á eigaranum hjá kettuni, kippnummarið, liturin og møgulig sereyðkenni hjá kettuni verða skrásett á Umhvørvisdeildini hjá Tórshavnar kommunu.

1) Ein mánað eftir at henda kunngerð er sett í gildi, skulu allar úti- ella leyst gangendi kettur í Nólsoy vera kippmerktar og skrásettar.

§ 2. Hvørt húski hevur bert loyvi til at have eina leyst gangendi kettu.
Forboð verður sett kettum, ið ikke eru skrásettar, at ganga leysar í Nólsoy.

1) Undantøk fyri at hava meira enn eina leyst gangandi kettu verða bert givin umsøkjara, sum hevði og enn hevur meira enn eina kettu, áðrenn Kunngerðin frá 1. februar 1995 varð lýst.

§ 3. Allar kettur, ið ganga leysar í Nólsoy, skulu bera hálsband og vera geldar.

1) Ein mánað eftir at henda kunngerð er sett í gildi, skulu allar leyst gangandi kettur í Nólsoy vera geldar. Umhvørvisdeildin hjá Tórshavnar kommunu kann til eina og hvørja tíð krevja at síggja djóralæknaváttan um geldingina.

Hondhevjan
Sambært grannastevnulógini skulu ein ella fleiri í økinum búsitandi menn hava eftirlit við at viðtøkurnar verða hildnar og boða sýslumanninum frá broti á viðtøkuna.

Ætlanin hjá Jens Kjeld Jensen verður væntandi viðgjørd á komandi grannastevnu í Nólsoy. Um uppskotið verður samtykt, so ynskir hann at Tórshavnar kommuna skal útvega lesara og eisini standa fyri at skráseta ketturnar. Hann hevur upplýst, at hann kemur við eini umsókn um hetta.

Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 28. november 2013:** Útsett.

**Tekniska nevnd 9. desember 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at fráboða sýslumanninum og grannastevnuni, at kommunan er ikki sinnað at átaka sær slíkar serligar eftirlitsuppgávur viðv. kettum í Nólsoy, sum lagt er upp til í frammanfyri nevnda uppskoti.

Helena D. á Neystabø og Marin Katrina Frýdal luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 30. januar 2014:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá teknisku nevndi við tí ískoyti, at lata málið til Føroya Kommunufelag at viðgera.

**13/14** **2013-2942**

**Val av limum og varalimum í stýrið fyri Lágargarð fyri 2 ár**

Hesir limir standa fyri vali:

| **Fastir limir:** | **Varalimir:** |
|---|---|
| Ronald Poulsen | Ása Poulsen |
| Ann Elisabeth Joensen | Jákup Danielsen |

**Býráðið 30. januar 2014:** Vald vóru

| **Fastir limir:** | **Varalimir:** |
|---|---|
| Ronald Poulsen | Útsett |
| Halla Samuelsen | Útsett |

**14/14** **2014-0025 KF**

**Uppskot til broyting av byggisamtyktini fyri Kollafjørð í sambandi við ætlaða bygging av dagstovni**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Býráðið samtykti 12. desember 2013 at játta 1,5 mió. kr. til keyp av grundøki og fyrireikingar til bygging av nýggjum dagstovni í Kollafirði (j.nr. 2013-2812).

Grundøkið, talan er um, er partur av matr. nr. 156a, millum Botnavegin og Sjóará, niðan ímóti kirkjugarðinum. Hetta økið liggur sambært byggisamtyktini fyri Kollafjørð sum D1 umráðispartur. Um dagstovnurin skal byggjast her, er neyðugt at byggisamtyktin verður broytt.

Á niðara parti av Botnarvegnum liggur eitt C2-øki fram við syðru síðu av vegnum. Hetta er uml. 20 m til 28 m til breiddar, soleiðis at ein frástøða verður hildin til ánna.

Býarskipanardeildin mælir til at byggisamtyktin fyri matr. nr. 156a verður broytt soleiðis, at linjan frá niðara parti av vegnum verður fylgd og ein frástøða verður hildin til ánna. Tvs. at eitt øki uml. 28 m til breiddar verður broytt til C2-øki (miðstaðarendamál, serstakliga ætlað stovnum v.m.) og restin av økinum oman til ánna framhaldandi verður D1-øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at byggisamtyktin verður broytt sambært kortskjali dagf. 7. januar 2014 (j. nr. 2014-0025/1).

**Tekniska nevnd 15. januar 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 30. januar 2014:** Einmælt samtykt.

**15/14** **2006-0527 KNN**

**Reglugerð fyri tøming av rottanga og spillvatnsreinsiverki í Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við § 2 í kunngerð nr. 186 frá 5. november 1993 skal kommunustýrið gera eina ætlan fyri tøming og burturbeining av spillvatnsevju í kommununi herundir ásetingar um hvussu ofta tømt verður. Við støði í m.a. hesi grein hevur kommunan gjørt eitt

uppskot til eina reglugerð fyri tøming av rottangum og spillvatnsreinsiverkum í Tórshavnar kommuna.

Støða skal verða tikin til, um heilsu- og umhvørvisnevndin kann samtykkja uppskotið til reglugerðina.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at heilsu- og umhvørvisnevndin samtykkir uppskotið til reglugerðina.

Fyrisitingin hevur gjørt eitt uppskot um hvussu gjaldast skal fyri tøming av rottangum og spillvatnsreinsiverkum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at heilsu- og umhvørvisnevndin samtykkir uppskotið til áseting av reglum fyri gjalding og prís fyri tøming.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 10. mai 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

Umsitingin leggur endaligt uppskot til reglugerð fyri nevndina aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Støða skal verða tikin til, um heilsu- og umhvørvisnevndin kann samtykkja uppskotið til reglugerðina og beina tað til endaliga viðgerð í býráðnum umvegis fíggjarnevndina.

Støða skal samstundis verða tikin til, um heilsu- og umhvørvisnevndin kann samtykkja tað fyrisitingarliga uppskotið til hvussu gjaldast skal fyri tøming av rottangum og spillvatnsreinsiverkum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at heilsu- og umhvørvisnevndin samtykkir uppskotið til reglugerðina og uppskotið til áseting av reglum fyri gjalding og prís fyri tøming, soleiðis at tað samlaða málið kann beinast víðari til endaliga viðgerð í býráðnum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 8. juni 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Leiðarin fyri kommunalu brennistøðina og býarverkfrøðingurin greiddu frá málinum.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 29. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Reglugerðin er dagførd, endurskoðað og orðingin er einfaldari. Í høvuðsheitum eru broytingarnar, sum niðanfyristandandi:
- Nærri er greina út, at privatborgarar gjalda einki fyri fyrstu tøming, og at øll onnur gjalda eitt gjald hvørja ferð tømt verður,
- skrásetingina av upplýsingum í telduskipanini er tillagað, og
- Heilsufrøðiliga starvsstovan er broytt til Umhvørvisstovan.

Í verandi rottangaskipan er bert møguleiki at senda rokning til virkir o.o, sum hava egnan rottanga, og ikki til virkir, stovnar, feløg v.m. sum eru knýtt í felags ”reinsiverk”. Orsøkin til hetta er, at eingin skráseting av hvørji virkir/stovnar eru knýtt í einstøku reinsiverkini finst, og at eingin útrokningarlykil er samtyktur fyri hvussu gjaldið skal ásetast til hesi og viðførir hetta, at ójavnvág er í gjøldum millum ymisk virkir/stovnar, t.v.s. at summi gjalda fyri hesa tænastu, meðan onnur einki gjalda.

Upplýsast skal, at ein stórur partur av virkjum, stovnum og feløgum eru knýtt at einum reinsiverki og fáa hesi onga rokning fyri rottangatøming. Mett verður, at um kostnaðarskipanin var fullfíggjað, vildi rottangaskipanin viðført eina meirinntøku á umleið kr. 4-500.000 árliga.

Fyri at skapa javnvág viðv. gjøldum er neyðugt at gera eina gjaldsskipan, sum tekur hædd fyri øllum, sum reglugerðin um rottangatøming fata um.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini og leiðarin á kommunalu brennistøðini mæla til at taka undir við broyttu reglugerðini og at heimila umsitingini at gera uppskot til gjaldsskipan, sum fatar um øll sum skulu gjalda fyri rottangatøming, at leggja fyri nevnd.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. mars 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Reglugerðin hevur verið til góðkenningar hjá Umhvørvisstovuni, sum hevði ymiskar viðmerkingar. Í nøkrum viðurskiftum skuldi teksturin greinast nærri og í nøkurum viðurskiftum skulu viðurskifti takast úr reglugerðini og heldur skrivast í eina vegleiðing. Umsitingini hevur framt rættingarnar og umhvørvisstovan hevur hin 14/11- 2013 góðkent reglugerðina.

Góðkenda reglugerðin frá Umhvørvsstovuni liggur í mál nr. 2006-0527/24 og er soleiðis:

# Reglugerð um rottangatøming

Við heimild í § 20 stk 1 í kunngerð nr. 53 frá 3. mai 1994 um umhvørvisreglur og § 8 í kunngerð nr. 186 frá 5. november 1993 um spillivatnsevju verður ásett:

## Gildisøki og allýsingar

**§ 1.** Reglugerðin er galdandi fyri tøming av øllum rottangum í Tórshavnar kommunu.
*Stk. 2.* Allýsingar:

"Rottangi" verður í hesi reglugerð nýtt sum felagsheiti fyri rottanga, septiktanga, trixtanga, reinsiverk ella líknandi skipan, hvørs endamál er at reinsa spillivatnið fyri mannaskarn.

"Eigari" merkir eigari av rottanga.

## Eigarans skyldur og ábyrgd

**§ 2.** Eigarar hava skyldu til at nýta ta kommunalu tømingarskipanina, sambært § 3, stk. 2 í kunngerðini um spillivatnsevju.
*Stk. 2.* Eigarar hava skyldu til at vísa á, hvar rottangin er staðsettur.
*Stk. 3.* Tann kommunala tømingarskipanin sleppur ikki eigara undan at tryggja, at rottangin er í góðum standi og virkar, sum hann eigur.
*Stk. 4.* Kommunan skal hava boð, tá ið rottangi verður settur, fluttur ella tikin burtur, og ávísingar frá kommununi um hesi viðurskifti skulu verða fylgdar.

## Atkoma

**§ 3.** Eigarar hava skyldu at tryggja, at tað slepst til rottangan.
*Stk. 2.* Hesi viðurskifti skulu vera í lagi, áðrenn tømt verður:
1) rottangin er lættur at koma til,
2) tað er grivið væl frá rundan um lokið,
3) lokið er væl fest, trygt og heilt,
4) lokið er lætt at loysa, tá ið tømt verður og lætt at festa aftur, tá ið arbeiðið er liðugt,
5) lokið má ikki viga meira enn 25 kg, og
6) at óviðkomandi lutir og evni ikki eru í rottanganum.

## Títtleiki

**§ 4.** Kommunan skipar fyri og hevur eftirlit við, at rottangar verða regluliga tømdir, tað er umleið eina ferð um árið.
*Stk. 2.* Er tørvur á eyka tøming, umframt ta regluligu tømingina, hevur eigarin skyldu at biðja um eykatøming.

## Gjald

**§ 5.** Privat húsarhald gjalda ikki fyri árliga rottangatøming. Verður tømt oftari enn kravdu ferðina, rinda privathúsarhald eitt gjald sambært gjaldsskrá, sum samtykt av býráðnum við heimild í § 8 í kunngerð nr. 186 frá 5. november 1993 um spillvatnsevju.
*Stk. 2.* Øll onnur enn privat húsarhald, herundur virkir, almennir stovnar, feløg v.m. rinda eitt av býráðnum ásett gjald fyri rottangatøming

*Stk. 3.* Ber ikki til at tøma rottangan í fyrstu atløgu, t.d. tí at staðsetingin av rottanga ikki er fráboðað, og/ella eigari ikki hevur hildið skyldur sínar sambært § 3, kann nýggj roynd at tøma rottangan verða gjørd fyri eigarans rokning eftir gjaldi, ið býráðið ásetir (gjald fyri rottangatøming).
*Stk. 4.* Eru fleiri húski og/ella virkir knýtt í sama rottanga, ber skrásetti eigarin útreiðslurnar í sambandi við rottangatømingina.

**Boð, treytir og forboð**

**§ 6**. Verða ásetingarnar í § 3, í hesi reglugerð ikki fylgdar, kann Tórshavnar kommuna geva boð um neyðugar ábøtur ella broytingar.

*Stk. 2.* Um boð, sum verða givin sambært hesi reglugerð, ikki verða lýdd innan ásettu freist, kann kommunan sambært § 28 í kunngerðini um umhvørvisreglur lata arbeiðið gera fyri rokning tess, ið er skrásettur eigari.

**Kærumál**

**§ 7.** Avgerðir hjá Tórshavnar kommunu eftir hesi reglugerð kunnu sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd við seinni broytingum, kærast til Umhvørvisstovuna. Kæran skal sendast Tórshavnar kommunu, sum síðan sendir hana til Umhvørvisstovuna við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, avgerðin er fráboða avvarðandi. Er kærufreistin úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin

**Gildisreglur**

**§ 8.** Henda reglugerð er góðkend av Umhvørvisstovuni tann 14.11.2013, og samtykt á býráðsfundi tann xx.xx.2013. Reglugerðin kemur í gildi dagin eftir, hon er lýst.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin fyri byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at taka undir við reglugerðini, sum eisini er góðkend av Umhvørvisstovuni, okkara j.nr. 2006-0527/24.

**Tekniska nevnd 9. desember 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 30. januar 2014:** Einmælt samtykt.

**16/14** **2010-0498**

**Fígging av fótbóltsvølli í Hoyvík**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Tørvur er á fótbóltsvøllum í býnum, og m.a. fótbóltsfelagið FC Hoyvík hevur spurt Tórshavnar kommunu, hvørjar framtíðarætlanir kommunan hevur í Hoyvík viðvíkjandi hesum spurningi. Sum støðan er nú, fær felagið, eins og onnur nýggj feløg, einans 'avlopstíðir' til venjingar sínar, og hetta ger, at tað er sera trupult at menna felagið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heita á Byggi- og býarskipanardeildina um at kanna møguleikarnar fyri at staðseta ein fótbóltsvøll í Dalinum Langa, omanfyri Hoyvíkar skúla.

**Mentamálanevndin 3. mars 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Mikael Viderø, býararkitektur, greiðir frá kanningini.

**Mentamálanevndin 2. juni 2010:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Kunnað varð um málið.

**Mentamálanevndin 29. september 2010:** Málið varð umrøtt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. november 2010:** Nevndin samtykti at halda fast við staðsetingina av fótbóltsvølli í Hoyvík við skúlan við Løgmannabreyt.

**Mentamálanevndin 3. november 2010:** Framlagt og umrøtt.

**Ískoyti:**
Eftir áheitan frá formanninum, er hetta málið á skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. oktober 2011:** Málið tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í fíggjarætlanini eru 1,2 mió kr. tøkar til at staðseta og fyrireika fótbóltsvøll í Hoyvík. Víst verður á, at ov trongt er í Gundadali, og at Hoyvík eins og Argir eigur at hava egnan fótbóltsvøll til sítt felagslið.

Til tess at fyrireka fótbóltsvøllin, sum skal lúka krøvini hjá FSF, skal gerast tekniskt prosjekt og endaliga kostnaðarmeting. Arbeiðið at gera sjálvan vøllin kann somuleiðis byrja innanfyri givna fíggjarkarmin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1,2 mió kr. av kontu 5775 ítróttaranlegg (løgujáttan) til at fáa til vega tekniskt prosjekt og kostnaðarmeting av fótbóltsvølli í Hoyvík og at fáa byrjað sjálvt arbeiðið at gera vøllin.

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Rúni Djurhuus samtyktu at játta kr. 1,2 mió. av kontu 5775 ítróttaranlegg (løgujáttan) til

1) at eftirkanna staðsetingarmøguleikarnar
2) at fáa til vega tekniskt prosjekt og kostnaðarmeting
3) at fáa byrjað sjálvt arbeiðið at gera vøllin

og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 1,2 mió. av kontu 5775 ítróttaranlegg (løgujáttan) til

at eftirkanna staðsetingarmøguleikarnar
at fáa til vega tekniskt prosjekt og kostnaðarmeting
at fáa byrjað sjálvt arbeiðið at gera vøllin.

**Býráðið 29. mars 2012:** Býráðið samtykti at taka undir við fíggjarnevndini, at játta 1,2 mió. kr. av konto 5775 ítróttaranlegg (løgujáttan) til at byrja málið við at eftirkanna staðsetingarnar og leggja málið fyri faknevndir og býráðið til endaliga góðkenning, innan projekt verður gjørt.

Formaðurin ynskir málið á skrá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. juni 2012:** Samtykt at útseta málið til komandi fund.

**Ískoyti:**
Vísandi til býráðssamtyktina 29. mars 2012, kann arbeiðið við at eftirkanna staðsetingarnar at leggja fyri faknevndir og býráðið skipast soleiðis:

- arbeiðið at eftirkanna staðsetingarnar verður latið ráðgeva uttanífrá at gera.
- kanningin fevnir um staðsetingarnar sunnan fyri Skúlan við Løgmannabreyt og í Dalinum Langa, omanfyri Hoyvíkar skúla, umframt at kanna eftir um tað eru onnur øki í Hoyvík sum eru betri egnaði til endamálið.
- kanningin verður gjørd sum ein greining av avleiðingum av at leggja vøllin á hesum støðum og skal m.a. innihalda: plásstørv, víðkanarmøguleikar, pláss til áskoðarar, felagshús o.a., ávirkan á býarskipan, atkoma, ferðsla og parkering, ávirkan á grannalag (fysiskt og umhvørvisliga), veðurlagið og kostnað.

- settar verða upp til kr. 500.000 til hetta arbeiði.
- kanningararbeiðið verður boðið út sum undirhondsboð.

**Ískoyti:**
Formaðurin ynskir málið á skrá til umrøðu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Nevndin samtykti at eftirkanningin av staðsetingini verður gjørd eftir leistinum í ískoytinum omanfyri, at kanningin verður løgd fyri nevndina í september 2012 og at nevndin verður kunnað á komandi fundi.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur bjóðað gerð av kanning av staðsetingini út sum undirhondsboð millum HMP-Consult og Landsbyggifelagið. Sí útbjóðingarskjal TK j.nr.2010-0498/14. 2 tilboð er komin inn. Tilboð frá LBF áljóðandi 253.000 kr. og HMP-consult áljóðandi 249.000 kr. Sí hjálagt skjal lisitatiónsprotokol TK j.nr 2010-0498/16. HMP-Consult hevði lægsta tilboðið og er tí biðin um at standa fyri kanningini. Úrslitið av kaningini verður latin Tórshavnar kommunu 17.sept.2012.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. september 2012:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
HMP-Consult hevur latið inn kanning av tveimum møguligum staðsetingum í Hoyvík og eitt alternativt uppskot til staðseting. Kanningin viðgerð plásstørv, atkomuviðurskifti, víðkanar møguleikar, býarskipanarligar avleiðingar, sum lýst í útbjóðingartilfari. Sí kanningarúrslit j.nr. 2010-498/19/9 "Svarskriv til TK".

Samanumtikið er eingin beinleiðis niðurstøða, men eitt endaligt kjak av fyrimunum og vansum við ávíkavist staðseting A og B. Afturat er gjørt eitt alternativt uppskot til staðseting. Alternativa uppskotið er staðsett í norðara endanum av Dalinum Langa, og fevnir um ein vøll og eitt ítróttaranlegg við smærri vøllum og fótbóltshøll. Uppskotið vísir á møguleikan fyri einum ítróttaranleggi við víðkanar møguleikum. Uppskotið krevur tó umfatandi lendisviðgerð, og tað er ikki í samsvari við verandi ætlanir um íbúðarbygging á heygginum vestanfyri Føroya Tele, og ei heldur um ætlanir at varðveita Dalin Langa sum fríøki fyri býarpartin.

Umboð fyri HMP kemur á fundin at greiða frá kanningini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. oktober 2012:** HMP greiddi frá kanningini. Málið verður tikið uppaftur á seinni fundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2012:** Nevndin samtykti at umsitingin kemur við einum tilmæli til komandi fund.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur við støði í frágreiðingini frá HMP og grundað á ástaðafund mett um ymsu staðsetingarmøguleikarnar. Umsitingin metir ikki, at nakrar greiðar grundgevingar

og niðurstøða er sum talar fyri, at staðsetingin við Skúlan viðLøgmannabreyt er minni egnað enn staðsetingin viðMyllutjørn. Eftir ástaðarfundin metir umsitingin harumframt, at inntrivið í Dalin Langa gerst so mikið stórt við alternativa uppskotinum hjá HMP, at upprunaliga ætlanin at hava Dalin Langa sum fríøki í hesum tættbygda økinum, verður ikki møgulig.

Umsitingin hevur tí arbeitt víðari við málinum, og hevur, við atliti til ferðslumøguleikar, frástøðu frá verandi bústaðabygging í økinum, at minka um inntrivini í lendið og fyri at kunna varðveita møguleikan at gera Dalin Langa til fríøki, mett at ein onnur alternativ staðseting ovast í dalinum eystaru megin dalin, er møgulig. Avleiðingin av hesi staðseting er tó, at tað sum verður eftir av økinum eystaru megin Dalin Langa, sum upprunaliga er ætlað til tætta bústaðabygging, ikki kann nýtast til tað endamálið.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin velur millum staðsetingina við Skúlan við Løgmannabreyt ella alternativu staðsetingina ovast í Dalinum Langa, á eystaru síðu, og at játta avsetta fíggjarkarmin til vøllin, at gera endaligt prosjekt til valdu loysnina, og at beina málið í býráðið um mentamálanevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. desember 2012:** Ein meiruiluti: Levi Mørk og Jákup Símun Simonsen mælir til at staðseta vøllin sambært uppskot A í frágreiðing frá HMP Consult 17. september 2012 og at beina málið í faknevndir og býráðið sambært býráðssamtykt 29. mars 2012.

Ein minniluti: Bogi Andreasen mælir til at hava borgarafund um staðsetingarnar.

Ein minniluti: Elin Lindenskov tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 5. desember 2012:** Út frá einari heildarmeting, ið tekur atlit til bæði fíggjarlig og býarskipanarlig viðurskifti, samtykt at mæla býráðnum til at halda fast við upprunaligu staðsetingina av fótbóltsvøllinum við skúlan við Løgmannabreyt.

**Býráðið 13. desember 2012:** Fyrst varð **a**tkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at sleppa ætlanini at gera ein fótbóltsvøll í Hoyvík, vísandi til at talan er um íbúðarøki og harafturat er ov veðurhart til uttanduraleik. Tí verður býráðnum mælt til, at kanna møguleikarnar fyri at gera eina fótbóltshøll í Hoyvík, ið fall við einari atkvøðu fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddi: Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Jákup Símun Simonsen, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Vagnur Johannesen og Jan Christiansen.

Síðan varð atvkøtt um meirilutatilmæli frá Byggi og býarskipanarnevndini, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jákup Símun Simonsen, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Vagnur Johannesen og Jan Christiansen.

At enda varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddi: Marin Katrina Frýdal.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Samtykt at fyrireika og at byggja nýggjan vøll í Hoyvík og mæla býráðnum um fíggjarnevndina at játta kr. 1 mió av íløguætlanini 2013 konta 5775 at leggja aftrat tøku játtanini til endamálið konta 5775 L57014 Fótbóltsvøllur í Hoyvík.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við mentamálnevndini og játta kr. 1 mió. av íløguætlanini 2013 konta 5775 at leggja afturat tøku játtanini til endmálið og beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrina Frýdal, ið vísir til tilmælið á býráðsfundinum 13. desember 2012, um at sleppa ætlanini at gera fótbóltsvøll í Hoyvík grundað á, at staðið er sera ábært, liggur ov høgt, heili 120 m. oman fyri sjóvarmálan og tískil óegnað til uttanduraleik, harumframt er talan um eitt íbúðarøki. Mælt verður til at nýta tøku játtanina til at fyrireika og byggja eina fótbóltshøll í Hoyvík, ið fall við einari atkvøðu fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddi: Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Bogi Andreasen og Annfinn Brekkstein.

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Sjúrður Olsen og Jógvan Dam.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið var samtykt við 11 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam

Ímóti atkvøddi: Marin Katrina Frýdal

**Ískoyti:**
Í íløguætlanini fyri 2014 eru settar kr. 6 mió av til at byggja fótbóltsvøll í Hoyvík. Harumframt eru uml. 1,6 mió tøkar á verkætlanarkontuni 5775 L57014 fótbóltsvøllur í Hoyvík í sambandi við fyrireikingarnar.

Sum liður í fyrireikingunum eru gjørdar plantekningar og visualiseringar fyri vølli íroknað áskoðarapláss, felagshúsi/umklæðingarrúmum og skipan av atkomuviðurskiftum frá Karlamagnusarbreyt. Sambært uppskotinum, sum HMP Consult og SNA hava gjørt, verða áskoðarapláss og bygningur til umklæðing staðsett við atkomu frá Karlamagnusarbreyt.

Fyri at fáa betri tillaging til verandi lendi og bygging sunnanfyri og vestanfyri vøllin, og at fáa ein góðkendan fótbóltsvøll við teimum treytum, ið FSF setir til vøllir í bestu deildunum í Føroyum, verður mælt til at taka av – ella minka um – byggifeltini fram við Karlamagnusarbreyt eystarumegin. Talan er um byggifeltini 33, 35, 37, 39, 41, 43 og 45. Avleiðing er, at bygningarnir á hesum økjum ikki kunnu verða so stórir sum upprunaliga ætlað.

Gjørd er kostnaðarmeting fyri lendisarbeiði, álegging av vølli, vallarljósi, áskoðaraplássum uttan tak, vegagerð v.m. (í alt 17 ymsir postar), men ikki felagshøli (umklæðingarhøli). Her er ikki íroknað mvg og útreiðslur av, at øll byggifeltini og tilhoyrandi sokklar skulu broytast.

Í mun til tøku játtanina verður mett, at til ber at fara undir fyrsta partin av arbeiðinum í 2014.

Mett verður skilabest at fáa til vega útbjóðingartilfar fyri samlaðu verkætlanini so sum lýst í kostnaðarmetingini og tilfarinum frá ráðgevunum, og at arbeiðið verða bjóðað út í stigum. Kostnaður fyri at gera útbjóðingartifar klárt verður at fíggja av tøku upphæddini á kontu 5775 L57014 fótbóltsvøllur í Hoyvík. Harumframt skal greiða fáast á, hvussu byggifeltini við Karlamagnusarbreyt, ið verða ávirkað av verkætlanini, skulu tillagast, herundir fíggingina av hesum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta avsettu upphæddina kr. 6 mió á íløguætlanini fyri 2014 konta 5775 fyri 2014 til fyrireikingar og til byggiarbeiðið, at fáa til vega útbjóðingartilfar fyri samlaðu verkætlanini fíggjað av tøku upphæddini á kontu 5775 L57014 fótbóltsvøllur í Hoyvík, og at bjóða partar av arbeiðinum út í innbodnari lisitatión.

**Mentamálanevndin 8. januar 2014:** Samtykt at fáa til vega útbjóðingartilfar fyri samlaðu verkætlanini fíggjað av tøku upphæddini á kontu 5775 L57014 fótbóltsvøllur í Hoyvík beinanvegin, at bjóða partar av arbeiðinum út í innbodnari lisitatión og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 30. januar 2014:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti at taka undir við fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Bjørghild Djurhuus

Ímóti atkvøddi: Marin Katrina Frýdal

Marin Katrina Frýdal vísir til tilmælið sítt til býráðsfundin tann 2. mai 2013 og at tað harumframt er skeivt at seta stórar verkætlanir í gongd, áðrenn vissa er fingin fyri hvat hann kostar.

**17/14** **<u>2013-2156</u>**

**<u>Hallarætlanir fyri Landavegin, Gundadal og Argir</u>**

- Upprit kemur til fundin**.**

**Mentamálanevndin 10. september 2013:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina um at útvega kostnaðarmeting fyri dupulthøll við Landavegin, sum lýkur ásetingar í mun til altjóða dystir og krøv til multi funktionalitet innanfyri eina viku.

**Ískoyti:**
Í íløguætlanini fyri 2014 eru settar kr. 9 mió av til tvíhøll (dupulthøll) við Landavegin. Sambært samtyktini hjá mentamálanevndini skal talan verða um fleirfunktionella høll, sum lýkur ásetingar til altjóða dystir. Hugsað er her um serstakliga hondbólt og flogbólt, ið krevja ávísa hædd.

Frælsafeløgini Bragdið og Hvirlan eins og sersambandið fyri frælsar ítróttir í Føroyum (FÍF) hava víst kommununa á ynski um at tryggja frælsu ítróttini innandura umstøður í høllini, tí tørvurin á støðugari venjing um veturin uttan mun til illveður og hálku er

alneyðugur. Feløgini vísa á loysnir í eitt nú Svøríki, sum ikki krevja so nógv pláss og sum kunnu skipast saman við høllini (vøllunum) og ítróttavirkseminum annars.

Tað samlaða grundøkið matr. nr. 917 er lutvíst planerað. Til eina tvíhøll skal allur matrikkulin planerast, og hetta arbeiðið kann gerast nær sum helst. Økið er skipað sum D2 øki, tvs. ítróttaøki. Talan kann gerast um skipa økið í serstakari byggisamtykt, alt eftir, hvussu stór høllin verður.

Neyðugt er at viðgera nærri og ítøkiligera, hvat høllin skal rúma bæði av ítróttaumstøðum, felagshølum, fleirfunktionalietum so sum flytførar tribunir, skilja/leggja saman hallir, sjónvarping, stevnir, parkerings- og atkomuviðurskifti v.m., eins og møguleikan at byggja og taka í nýtslu bygningin í stigum. Harumframt at fáa gjørt eina kostnaðarmeting.

Til tess at ítøkiligera ætlanina er neyðugt við játtan at fyrireika eitt konseptuppskot at leggja fyri nevndina aftur sum grundarlag at útvega byggiskrá og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 0,5 mió av íløguætlanini fyri 2014 konta 5775 Ítróttarhøll við Landavegin til fyrireikingar.

**Mentamálanevndin 8. januar 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 30. januar 2014:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum við tí ískoyti, at beina málið aftur í mentamálanevndina við tí setningi, at gera eina heildarætlan sum eisini umfatar Argir, Hoyvík og Gundadal.

**18/14** **<u>2008-4554</u>**

**<u>Uppskot til dagføring av reglugerð fyri bátar á landi</u>**

Reglugerðin fyri bátar, sum standa á landi, bleiv seinast dagførd í 2009.

# Galdandi reglugerð fyri bátaplássini á landi

**§ 1**

Reglugerðin er galdandi fyri bátar í Tórshavnar kommunu, sum eru tiknir upp og standa á bátaplássunum í Tórshavnar kommunu.

§ 2

Eingin bátur má setast á ella flytast av bátaplássunum uttan fyrst at hava fráboðað hetta. Báteigarar í Tórshavn, á Argjum og í Kaldbak boða frá til bátaumsjónarmannin í Tórshavn, báteigarar í Kollafirði boða frá til havnaumsjónarmannin í Kollafirði, og
báteigarar í Nólsoy og Hestoy boða frá til umsjónarmannin á staðnum.

§ 3

Viðvíkjandi nýtslu av el, verður víst til *"Reglugerð fyri elveiting til smábátar"*

§ 4

Báteigarin hevur skyldu til at halda økið rundan um bátin reint og ruddiligt alla tíðina, meðan báturin stendur uppi. Um hetta ikki er gjørt á nøktandi hátt, kann Tórshavnar havn nokta fyri at báturin verður settur á sjógv, og/ella rudda upp fyri eigarans rokning.

§ 5

Báteigarin hevur sjálvur ábyrgdina av, at báturin er nóg væl skorðaður. Allir bátar, sum verða settir á bátaøkið, skulu vera merktir soleiðis, at tað greitt sæst hvør eigur bátin. Um havnamerki, nr. TN/VN, ikki stendur á, so skal annað frámerki við navni á eigara setast á. Ómerktir bátar verða fluttir av økinum, og um eigarin ikki ger vart við seg, verður báturin burturbeindur fyri eigarans rokning og ábyrgd.

§ 6

Bátarnir kunnu standa ókeypis á økinum frá 1. decembur til 28. februar.
Í tíðarskeiðinum frá 1. mars til 30. novembur verður goldið soleiðis.

| Breidd | Staðið á plássinum | Gjald pr. dag |
|---|---|---|
| 150 - 259 cm. | Styttri enn 18 dagar | Onki |
| 150 - 259 cm. | Longri enn 18 dagar | 30,- kr./dag longri enn 18 dagar |
| 260 og breiðari | Styttri enn 18 dagar | Onki |
| 260 og breiðari | Longri enn 18 dagar | 50,- kr./dag longri enn 18 dagar |

Bæði dagurin, har báturin kemur á plássið, og dagurin har báturin verður fluttur av plássinum, verða roknaðir sum heilir dagar.

§ 7

Um báteigarin flytur úr kommununi, hevur hann skyldu til beinanvegin at flyta bátin av bátaplássunum hjá Tórshavnar kommunu.

§ 8

Bátavognar/stólar hava bert loyvi at standa á økinum, meðan bátur stendur í. Allir bátavognar/stólar o.a, skullu vera merktir, soleiðis at Tórshavnar havn veit, hvør eigur úrgerðina. Tá bátur er flotaður, ella á annan hátt fluttur av bátaøkinum, skal bátavognur/stólur o.a flytast av økinum innan 24 tímar eftir, at báturin er flotaður/farin av økinum.

Eftir hetta verða tómir bátavognar/ stólar o.a fluttir av økinum, og um eigarin ikki ger vart við seg, verður útgerðin burturbeind fyri eigarans rokning og ábyrgd.

Tað er strangliga bannað, at flyta bukkar og annan útbúnað, sum er ogn hjá Tórshavnar havn, av bátaøkinum.

§ 9

Henda reglugerð er partur av reglugerð fyri nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu, og kann brot á hesa reglugerð viðføra, at nýtslurætturin til bátaplássið verður slitin. Reglugerðin kemur í gildi 1. januar 2009.

**Reglugerðin kemur at síggja soleiðis út:**

# Reglugerð fyri bátaplássini á landi

§ 1

Reglugerðin er galdandi fyri bátar í Tórshavnar kommunu, sum eru tiknir upp og standa á bátaplássunum í Tórshavnar kommunu. Tað er Tórshavnar havn, sum umsitur økinu til bátapláss á landi.

§ 2

Báteigarin hevur skyldu til at halda økið rundan um bátin reint og ruddiligt alla tíðina, meðan báturin stendur uppi. Um hetta ikki verður gjørt á nøktandi hátt, kann Tórshavnar havn nokta fyri at báturin verður settur á sjógv, og/ella rudda upp fyri eigarans rokning og ábyrgd.

§ 3

Báteigarin hevur sjálvur ábyrgdina av, at báturin er nóg væl skorðaður, eins og allir bátar sum verða settir á bátaøkið, skulu vera merktir soleiðis, at tað greitt sæst, hvør eigur bátin. Um havnamerkis nr. TN/VN ikki stendur á, so skal annað frámerki við navni á eigara setast á. Ómerktir bátar verða fluttir av økinum, og um eigarin ikki ger vart við seg, verður báturin burturbeindur fyri eigarans rokning og ábyrgd.

§ 4

Bátarnir kunnu standa ókeypis á økinum frá 1. december til 30 mars.

Í tíðarskeiðinum frá 31. mars til 30. november verður goldið soleiðis:

Tómir bátavognar/stólar gjalda alt árið.

Bæði dagurin, har báturin kemur á plássið, og dagurin har báturin verður fluttur av plássinum, verða roknaðir sum heilir dagar.

**§ 5**

Um báteeigarin flytur úr kommununi, hevur hann skyldu til beinanvegin at flyta bátin av bátaplássinum hjá Tórshavnar kommunu.

**§ 6**

Bátavognar/stólar, sum standa á bátaøkinum, skulu vera merktir við navni eigarans.
Vognar/stólar, sum ikki eru merktir, verða fluttir av økinum og seinni burturbeindir, um eigarin ikki ger vart við seg.
Vognar/stólar, sum eru merktir og standa uttan bát, gjalda 30,- kr/dag og er hetta uttan mun til stødd ella skap. Hendan skipanin er galdandi alt árið, og gjaldið verður kravt frá fyrsta degi, ið vognurin/stólurin stendur tómur.

Tað er strangliga bannað at flyta bátabukkar ella annan útbúna, sum er ogn hjá Tórshavnar havn, av økinum.

**§ 7**

Henda reglugerð er partur av reglugerð fyri nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu, og kann brot á hesa reglugerð viðføra, at nýtslurætturin til bátaplássið verður slitin.

Reglugerðin kemur í gildi 1. mars 2014.

**Viðmerkingar til broytingarnar:**

**§ 1**

Tað er Tórshavnar havn, sum vegna Tórshavnar kommunu, umsitur bátaplássini.

**§ 2**

Hendan reglan er ikki neyðug. Tað er umsjónin í Tórshavn, sum umsitur øll bátaplássini, og ikki umsjónarmaðurin í ávikavist Kollafirði, Nólsoy og Hesti.

§ 3

Reglugerðin fyri bátaplássini á landi er í høvuðsheitum gladandi fyri bátar, sum standa á landi í Tórshavn og á Argjum, og har er reglugerðin ikki aktuel, tí har rindar brúkarin fyri nýtsluna við korti.

§ 4

Tað vísir seg at tað er rímiliga gott pláss á økinum um veturin, tí verður skotið upp, at leingja tíðarskeiðið, har bátarnir kunnu standa uppi uttan at gjalda, við einum mánaða.

Eisini verður skotið upp at leingja tíðarskeiðið, har bátarnir um summarið kunnu standa uppi ókeypis, við 12 døgum til 30 dagar tilsamans.

Sum nú er, gjalda tómir bátavognar onki gjald. Hetta er ein trupulleiki, tí teir fylla líka nógv á økinum sum ein bátur, og forðar soleiðis øðrum at brúka plássið. Skotið verður tí upp, at teir gjalda tað sama sum ein bátur.

§ 6

Hetta er ein umskriving av verðandi reglum, har tað serliga verður hugsað um, at vognarnir ikki eru merktir, og at gjald verður sett á tómar vognar.

§ 7

Skotið verður upp, at reglugerðin kemur í gildi 1. mars 2014.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at samtykkja broytingarnar.

**Vinnunevndin 13. januar 2014:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen og Annfinn Brekkstein luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 30. januar 2014:** Einmælt samtykt.

**19/14** **2007-3567**

**Uppskot til dagføring av reglugerð fyri nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu**

## Galdandi reglugerð fyri nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu

Hendan reglugerð er galdandi fyri allar báteeigarar, sum hava fingið nýtslurætt til bátapláss í Tórshavnar kommunu.
Tað er Tórshavnar havn, (Th) sum umsitur bátaplássini.

**§ 1**

Báteeigarar hava skyldu til at fara væl um bátaplássið, økið á landi og flótibrýrnar.

Stk.2 Tað er ikki loyvt at hava amboð, fiskireiðskap ella nakað annað tilfar liggjandi á landi við bátaplássið ella á flótibrúgvunum.
Allir slíkir lutir ella tilfar verður uttan ávaring fyribeint fyri eigarans rokning og ábyrgd.

Stk.3 Tað er strangliga bannað at koyra garnar, høvd ella annað á sjógv innan fyri brimgarðarnar.

Stk.4 Báteeigararnir hava skyldu til at halda bátin lens, at binda hann soleiðis, at endarnir liggja væl og ikki slítast óneyðugt, og at hann ikki er til ampa fyri onnur ella kemur at skaða aðrar bátar ella ognir í havnini.

Stk.5 Tá siglt verður inni í havnini, skal ferðin verða so lítil sum gjørligt, soleiðis at aðrir bátar, ið sigla ella liggja bundnir, ikki skulu fáa skaða.

Stk.6 Báteeigarar hava skyldu at akta boðini frá bátaumsjónarmanninum, eisini um hesin ynskir, at báturin verður fluttur.

Stk.7 Fyri at forða fyri at olja fer á sjógv, er tað skylda hjá øllum báteeigarum, at hava eitt nøktandi "kjølsvín" liggjandi í kjølinum.

**§ 2**

Báteeigarin hevur rætt til at nýta bátaplássið til bát, sum hann sjálvur eigur hálvpart ella meira av.

Stk.2 Th kann undantaksvís geva loyvi til, at báteeigari, íð eigur minni enn hálvpart, hevur rætt til at brúka plássið.

Stk.3 Th kann altíð krevja nøktandi skjalprógv fyri eigaraviðurskiftunum í bátinum.

Stk.4 Eftir umsókn kann bátaeigarin lata ein av lívsarvingum sínum yvirtaka nýtslurættin til bátaplássið.

Stk.5 Bátaeigarin hevur á ongan hátt loyvi at lata onnur enn lívsarvingar sínar yvirtaka bátaplássið.

**§ 3**

Bátaeigarin tekur við plássinum í tí standi, tað er, tá hann fær tað. Um bummur/teymur ella annað er brotið/skatt, skal hann gera vart við hetta beinanvegin. Ger hann ikki tað, verður hann mettur at hava ábyrgdina av skaðanum.

**§ 4**

Bátaeigarin hevur ábyrgdina av bátaplássinum og skal endurgjalda skaðar, ið koma á útbúnaðin, sum t.d. bummar, festir og á aðrar bátar uttan so, at hesir koma av illveðri ella øðrum, sum bátaeigarin ikki hevur ábyrgdina av.

Stk.2 Th skal bøta um teir skaðar, ið stava frá illveðri, vanligum sliti og elli.

**§ 5**

Um bátaeigarin ikki eigur bát, tá hann fær bátaplássið, skal hann ogna sær bát innan ½ ár frá tí, hann hevur fingið boð um, at hann hevur fingið bátapláss.

Stk.2 Um bátaeigarin selur bát sín, skal hann beinanvegin skrivliga boða Th frá.

Stk.3 Hevur bátaeigarin ikki, áðrenn ½ ár frá søludegnum at rokna, fingið sær annan bát, er nýtslurætturin til bátaplássið fallin burtur, og Th letur øðrum bátaeigara tað.
Bátaeigarin hevur tó loyvi at selja part í bátinum, men má sjálvur altíð eiga hálvpart ella meira í bátinum, sí tó §2 stk.2. Søla av parti í bátinum skal altíð fráboðast Th beinan vegin.

Stk.4 Um bátaeigari í meira enn ½ ár ikki hevur nýtt bátaplássið til egnan bát, hevur Th rætt at uppsiga leigumálið, og lata øðrum umsøkjara bátaplássið.

Stk.5 Bátaeigari, sum ætlar at keypa størri/minni bát, skal skrivliga søkja Th um størri/minni pláss. Umsókn um broyting av bátaplássið verður tillutað eftir aldrinum á umsókníni.

**§ 6**

Um bátaeigarin ikki fer at nýta plássið í 20 samanhangandi dagar ella meira, hevur hann skyldu til beinanvegin at boða Th frá.

Stk.2 Th hevur rætt til at lata onnur nýta bátaplássið, uttan at báteigarin fær leiguna endurgoldna fyri tað tíðarskeiðið.

**§ 7**

Báteigarin kann lata bátaplássið aftur til tann 1. í einum mánaða.

**§ 8**

Um Th skal brúka økið til okkurt annað, ella neyðugt verður at flyta bátaplássini av øðrum orsøkum, hevur Th rætt til at taka bátaplássið aftur við 3 mánaða ávaring.

**§ 9**

Leiga verður goldin samsvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi leigugjøldum fyri bátapláss í Tórshavnar kommunu.

**§ 10**

Hóast Th hevur 3 mánaða uppsagnartíð, kann Th, aftan á skrivliga ávaring, taka plássið aftur, um reglugerðin verður brotin.

Brot á reglugerðina kann fevna um, men er ikki avmarkað til:

Stk.2 Um leiga ikki er goldin 7 gerandisdagar aftan á falldag, og leigarin ikki hevur goldið eftirstøðuna áðrenn 10 gerandisdagar aftan á, at eigarin hevur sent honum innskrivað bræv við kravi um gjalding av eftirstøðuni og gjørt greitt, at bátaplássið verður tikið aftur um eftirstøðan ikki verður goldin sum ásett.

Stk.3 Um leigarin fremur onnur brot á reglugerðina og ikki beinanvegin heldur uppat við tí, hóast hann hevur fingið skrivliga ávaring.

Stk.4 Um leigari ikki aktar boð frá bátaumsjónarmanninum, eisini um hesin ynskir, at báturin verður fluttur í annað pláss, støðugt ella fyri eitt stytri tíðarskeið.

**§ 11**

Um báteigarin flytur úr kommununi, verður bátaplássið tikið aftur uttan ávaring.

**§12**

Tá ið bátaplássið er latið/tikið aftur, hevur báteigarin skyldu til at flyta bátin beinanvegin. Verður hetta ikki gjørt, verður báturin tikin upp á land fyri báteigarans rokning.

**§ 13**

Reglugerðin kemur í gildið tann 1.januar 2008.

Stk.2 Reglugerðin, fyri leigarar av bátaplássi í Tórshavnar kommunu, sum kom í gildið 1. mai 2006, fer samstundis úr gildi.

**Reglugerðin kemur at síggja soleiðis út:**

## Reglugerð fyri nýtslu av bátaplássum í Tórshavnar kommunu

Hendan reglugerð er galdandi fyri allar bátaeigarar, sum hava fingið nýtslurætt til bátapláss í Tórshavnar kommunu. Tað er Tórshavnar havn, sum umsitur bátaplássini.

**§ 1**

Bátaeigarar hava skyldu til at fara væl um bátaplássið, økið á landi og flótibrýrnar.

Stk.2 Tað er ikki loyvt at hava amboð, fiskireiðskap ella nakað annað tilfar liggjandi á landi við bátaplássið ella á flótibrúgvunum.
Allir slíkir lutir ella tilfar verður uttan ávaring fyribeint fyri eigarans rokning og ábyrgd.

Stk.3 Tað er strangliga bannað at koyra garnar, høvd ella annað á sjógv innan fyri brimgarðarnar.

Stk.4 Bátaeigararnir hava skyldu til at halda bátin lens, at binda hann soleiðis, at endarnir liggja væl og ikki slítast óneyðugt, og at hann ikki er til ampa fyri onnur ella kemur at skaða aðrar bátar ella ognir í havnini.

Stk.5 Tá siglt verður inni í havnini, skal ferðin verða so lítil sum gjørligt, soleiðis at aðrir bátar, ið sigla ella liggja bundnir, ikki skulu fáa skaða.

Stk.6 Bátaeigarar hava skyldu at akta boðini frá bátaumsjónarmanninum, eisini um hesin ynskir, at báturin verður fluttur.

Stk.7 Fyri at forða fyri at olja fer á sjógv letur Th árliga eitt kjølsvín til hvønn bátin. Tað er skylda hjá øllum bátaeigarum, at hava hetta liggjandi í kjølinum.

**§ 2**

Bátaeigarin hevur rætt til at nýta bátaplássið til bát, sum hann sjálvur eigur hálvpart ella meira av.

Stk.2 Th kann undantaksvís geva loyvi til, at bátaeigari, ið eigur minni enn hálvpart, hevur rætt til at brúka plássið.

Stk.3 Th kann altíð krevja nøktandi skjalprógv fyri eigaraviðurskiftunum í bátinum.

Stk.4 Eftir umsókn kann bátaeigarin lata hjúnafelaga ella ein av lívsarvingum sínum yvirtaka nýtslurættin til bátaplássið.

Stk.5 Bátaeigarin hevur á ongan hátt loyvi at lata onnur enn hjúnafelaga, ella ein av lívsarvingum sínum yvirtaka bátaplássið.

**§ 3**

Bátaeigarin tekur við plássinum í tí standi, tað er, tá hann fær tað. Um bummur/teymur ella annað er brotið/skatt, skal hann gera vart við hetta beinanvegin.
Ger hann ikki tað, verður hann mettur at hava ábyrgdina av skaðanum.

**§ 4**

Bátaeigarin hevur ábyrgdina av bátaplássinum og skal endurgjalda skaðar, ið koma á útbúnaðin, sum t.d. bummar, festir og á aðrar bátar uttan so, at hesir koma av illveðri ella øðrum, sum bátaeigarin ikki hevur ábyrgdina av.

Stk.2 Th skal bøta um teir skaðar, ið stava frá illveðri, vanligum sliti og elli.

**§ 5**

Um bátaeigarin ikki eigur bát, tá hann fær bátaplássið, skal hann ogna sær bát innan ½ ár frá tí, hann hevur fingið boð um, at hann hevur fingið bátapláss.

Stk.2 Um bátaeigarin selur bát sín, skal hann beinanvegin skrivliga boða Th frá.

Stk.3 Hevur bátaeigarin ikki, áðrenn ½ ár frá søludegnum at rokna, fingið sær annan bát, er nýtslurætturin til bátaplássið fallin burtur, og Th letur øðrum bátaeigara tað.
Bátaeigarin hevur tó loyvi at selja part í bátinum, men má sjálvur altíð eiga hálvpart ella meira í bátinum, sí tó §2 stk.2 Søla av parti í bátinum skal altíð fráboðast Th beinanvegin.

Stk.4 Um bátaeigari í meira enn ½ ár ikki hevur nýtt bátaplássið til egnan bát, hevur Th rætt at uppsiga leigumálið, og lata øðrum umsøkjara bátaplássið.

Stk.5 Bátaeigari, sum ætlar at keypa størri/minni bát, skal skrivliga søkja Th um størri/minni pláss. Umsókn um broyting av bátaplássi verður tillutað eftir aldrinum á umsókníni.

**§ 6**

Um bátaeigarin ikki fer at nýta plássið í 20 samanhangandi dagar ella meira, hevur hann skyldu til beinanvegin at boða Th frá.

Stk.2 Th hevur rætt til at lata onnur nýta bátaplássið, uttan at bátaeigarin fær leiguna endurgoldna fyri tað tíðarskeiðið.

**§ 7**

Bátaeigarin kann lata bátaplássið aftur til tann 1. í einum mánaða.

**§ 8**

Um Th skal brúka økið til okkurt annað, ella neyðugt verður at flyta bátaplássini av øðrum orsøkum, hevur Th rætt til at taka bátaplássið aftur við 3 mánaða ávaring.

**§ 9**

Leiga verður goldin samsvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi leigugjøldum fyri bátapláss í Tórshavnar kommunu.

**§ 10**

Hóast Th hevur 3 mánaða uppsagnartíð, kann Th, aftan á skrivliga ávaring, taka plássið aftur, um reglugerðin verður brotin.

Brot á reglugerðina kann fevna um, men er ikki avmarkað til:

Stk.2 Um leiga ikki er goldin, eftir at leigarin hevur móttikið 3. rykkjaran, sum verður sendur sum innskrivað bræv, verður bátaplássið tikið inn og latið øðrum umsøkjara.

Stk.3 Um leigarin fremur onnur brot á reglugerðina og ikki beinanvegin heldur uppat við tí, hóast hann hevur fingið skrivliga ávaring.

Stk.4 Um leigarin ikki aktar boð frá bátaumsjónarmanninum, eisini um hesin ynskir, at báturin verður fluttur í annað pláss, støðugt ella fyri eitt stytri tíðarskeið.

**§ 11**

Um bátaeigarin flytur úr kommununi, verður bátaplássið tikið aftur uttan ávaring.

**§ 12**

Tá ið bátaplássið er latið/tikið aftur, hevur bátaeigarin skyldu til at flyta bátin beinanvegin. Verður hetta ikki gjørt, verður báturin tikin upp á land fyri bátaeigarans rokning.

§ 13

Reglugerðin kemur í gildið tann 1mars 2014

Stk.2 Reglugerðin, fyri leigarar av bátaplássi í Tórshavnar kommunu, sum kom í gildið 1. januar 2008, fer samstundis úr gildi.

Viðmerkingar til broytingarnar:

§ 1

Stk 7: Aftan á at reglugerðin var komin í gildi, bleiv samtykt, at báteigararnir skuldu fáa eitt ókeypis kjølsvín um árið.

§ 2

Stk 4 og stk 5:Tað eru nógv, sum standa á bíðilista til bátapláss. Fyri at byggja upp fyri, at bátaplássini verða seld saman við bátinum, er tað ásett í reglugerðini, at tað bara er ein av lívsarvingunum, sum kann yvirtaka nýtslurættin til bátaplássið. Hendan skipanin hevur rigga væl, men er kanska heldur avmarkandi, tá hjúnarfelagin ikki hevur rætt til at yvirtaka plássið.

§10

Stk 2: Hendan reglan er broytt, so hon hóskar betur til tær mannagongdir, sum eru fyri rykkjarar hjá Th.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir  til at samtykkja broytingarnar.

**Vinnunevndin 13. januar 2014:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen og Annfinn Brekkstein luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 30. januar 2014:** Einmælt samtykt.

**20/14** **2011-2165**

**Óbygt stykkið, matr. nr. 1145bu, Faksagøta 6, Tórshavn**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Talan er um eitt óbygt grundstykki frá útstykkingini á NorðastaHorni, sum var liðug í 1984, og er skeytið tinglýst 18. januar 1984.

Løgdeildin hevur rykt um byggifreist.

Sambært tinglýstum servitutti, skulu sethús verða bygd á stykkinum innan 8 ár frá tí, at endaligt skeytið er tinglýst. Annars fellur stykkið aftur til seljarans, móti, at keyparin fær keypspeningin og tað hann hevur goldið fyri byggibúning, afturgoldið uttan rentur.

Keyparin hevur ikki loyvi til at selja stykkið víðari, fyrr enn sethús eru bygd á stykkinum.

Eigarin sum býr í Danmark, hevur ongan áhuga í at byggja á grundstykkið, og hevur nú avgjørt at lata grundstykkið innaftur til kommununa fyri upprunað keypsprísin kr. 107.500,00.

**Tilmæli.**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at keypa grundstykkið fyri kr. 107.500,00.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og selja stykkið í fríari sølu og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen og Annfinn Brekkstein luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 30. januar 2014:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal um at selja stykki sambært grundstykkjalistanum, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Rúni Djurhuus, Marin Katrina Frýdal og Elin Lindenskov

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Jákup Dam og Bjørghild Djurhuus.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Tróndur Sigurdsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam.

Greiddu ikki atkvøðu: Rúni Djurhuus, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr og Bjørghild Djurhuus.

**21/14** **2013-2713 AMDO**

**Umsókn um brúksrætt til kommunalt vegaøki burturav matr. nr. ad, Tórshavn.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
ZETA architect søkja vegna P/F Poul Hansen Heilsøla um brúksrætt til økið fram við bygningunum, á matr nr. 180c, 180d, og180e (Bryggjubakki 4, 6 og 8), ið er vegastrekkið niðan móti Havnar kirkju.

Umtalaða økið er uml. 2,5 m x 18,45 m.

Ætlanin er, hvat útgrevstrinum viðvíkir, at fáa nýggja inngongd frá Bryggjubakka, ið betrar atkomumøguleikar og rýmingarleið frá 1. hædd, samstundis sum hølini á 1. hædd verða ljósari. Í sambandi við útgrevsturin verður m. a. eisini frárensluviðurskiftuni loyst.

**Ætlan:**
Visjónin fyri bygningin hjá Poul Hansen Heilsølu er gjørd ítøkilig í eini ætlan í 4 stigum, ið eisini kundi verið nýtt til aðrar bygningar í Vágsbotni.

Í ætlanir-partinum verða tey 4 stigini: atkoma & opinleiki, fjøltáttað funktións hús, útiøki og livandi vestursíða.

**Leiðingar o. a.:**
Á økinum har útgrevsturin skal verða, liggja bæði SEV-kaðalir, tele-kaðalir, kloakk leiðingar og rottangar. Sí viðhefta yvirlitskort.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í 2. grundumráði í serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

**Skjøl:**

- Støðumynd 1:100, Tvørskurður A-A 1:200, Longdarskurður B-B 1:100, Flatmynd/longdarskurður 1:100, Myndir – j.nr.: 2013-2713/1.
- Bentley yvirlitskort.

**Tilmæli.**
Kommunustjórin og løgdeildin mæla til, at fíggjarnevndin tekur støðu til, og avgreiðir málið um nýtslurætt til kommunala vegaøkið oman fyri bygningin, sambært umsóknini, og at beina málið í teknisku nevnd at viðgera og avgreiða teknisk viðurskifti og ferðsluviðurskifti í samband við ætlanina.

**Fíggjarnevndin 13. november 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Málið hevur ikki verið til viðgerðar í ferðslunevndini enn. Men á fundinum 18.12.2013 verða spurningar um einvegis ferðslu á økinum umrøddir og hvønn veg ferðslan ætlandi skal koyra. Spurningurin um atkomu fyri jarðarferum skal eisini viðgerast eins og støðan við færri p-plássum skal viðgerast.

Í sambandi við møguligt anlegsarbeiði, skulu eisini atlit verða tikin til um talan verður um at umleggja verandi leiðingar í vegkassanum. Tað fyriliggur í løtuni eingin kostnaðarmeting av hesum arbeiði.

**Tekniska nevnd 9. desember 2013:** Málið umrøtt og verður tikið upp aftur á seinni fundi.
Helena D. á Neystabø og Marin Katrina Frýdal luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Ferðslunevndin 18. desember 2013:** Nevndin metir, at einki er til hindurs fyri at ganga umsóknini á møti, treytað av at til- og frákoyringarviðurskiftini verða á sama støði sum í dag. Ynski er at fáa útgreinað nærri, hvussu girðing millum komandi farbreyt og uppihaldsøki hjá umsøkjaranum fara at verða gjørd. Nevndin ynskir at viðgera málið, tá fullfíggjað prosjekt fyriliggur.
Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umboð fyri umsøkjaran kemur á fundin at greiða frá.

**Tekniska nevnd 15. januar 2014:** Nevndin samtykti at taka undir við fíggjarnevndini 13. nov. 2013 um at játta brúksrætt, treytað av at ferðsluviðurskiftini verða nærri lýst og loyst sambært samtykt í ferðslunevndini 18. des. 2013. Viðv. tekniskum leiðingum í økinum, samtykti nevndin, at umsøkjarin í samráð við umsitingina ger eina ætlan fyri neyðugar flytingar av leiðingum, og at umsøkjarin rindar fyri slíkar flytingar. Eisini verður sett sum treyt, at vegalinjan móti kirkjugarðinum verður óbroytt.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta brúksrætt við teimum treytum, sum tekniska nevnd hevur samtykt.

**Býráðið 30. januar 2014:** Einmælt samtykt.

22/14 **2013-1954**

**Umsókn frá Hans Petur í Brekkunum um stuðul til Frigg Festivalin 2014**

Søkt verður um stuðul ella samstarv við Tórshavnar kommunu í sambandi við Frigg Festivalin, sum verður í Keypmannahavn 9.-10. mai 2014.

Ætlanin er, at festivalurin verður eitt afturvendandi tónleika- og mentanartiltak, sum verður hildin á hvørjum ári, við tónleikarum og listafólkum úr Føroyum, Grønlandi, Íslandi og Danmark. Í ár verður Frigg Festivalurin í Kongens Have, men ætlanin er, at hann skal halda til á Bryggjuni frá 2015, tá brúgvin væntandi er liðug, sum bygd verður millum Nyhavn og Bryggjuna.

Fyrireikararnir skjóta upp, at Tórshavnar kommuna hevur ein kunningarbás á festivalinum og sostatt gerst partur av tiltakinum. Fyri básin skal kommunan rinda kr. 50.000. Eisini verður skotið upp, at Tórshavnar kommuna kann gjalda einum tónleikabólki 25.000 kr fyri at umboða kommununa á Frigg Festivalinum.

Sambært fíggjarætlanini pr. 11.11.2013 eru útreiðslurnar mettar til kr. 2.410.000, og inntøkurnar kr. 2.470.000, tá stuðul / samstarvsavtalur eru tald við.

Frigg Festivalurin søkti stuðul frá grunninum Vestnordisk hovedstadsfond Nuuk, Reykjavík og Tórshavn, og á fundi 24. mai 2013 játtaði grunnurin Frigg Festivalinum kr. 60.000 í stuðli.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 50.000,00 til ein bás á festivalinum.

**Mentamálanevndin 27. november 2013:** Samtykt ikki at játta stuðul.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Samtykt at játta kr. 50.000 til ein kunningarbás á festivalinum av konto 7312.

Býráðslimur biður um málið á skrá.

**Býráðið 30. januar 2014:** Framlagt.

23/14 2006-3283

Brúgvin um Sandá

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Vísandi til málsgongd í málinum j. nr. 2001-0695, við býráðssamtykt av 22. mai 2003, hevur umsitingin umrøtt málið og er av tí fatan, at umráðandi er at kanna aðrar møguleikar fyri tilgongd til málið.

Umsitingin mælir tískil til at leita ráðgeving hjá serfrøðingum innan brúgvabygging við tí fyri eyga at fáa til vega hóskandi byggilistarligt snið, teknisk og fíggjarliga forsvarlig brúgvagerð, sum samstundis líkar krøvini hjá friðingarmyndugleikunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða 500.000 kr at gera arbeiðs- og byggiskrá við tilhoyrandi skitsuuppskoti til støðutakan, vísandi til mannagongd fyri verkætlanum hjá Tórshavnar kommunu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 30. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 500.000 av íløgum.

**Býráðið 16. november 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Val av býráðslimum til bygginevnd fyri Brúnna um Sandá sambært § 36 í kommunustýrislógini

**Býráðið 27. september 2007:** Valdir vóru Jógvan Arge og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Umval av býráðslimum í bygginevndina Brúgv um Sandá sambært § 36 í kommunulógini.

**Býráðið 26. november 2009:** Valdir vórðu Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Sambært yvirliti yvir arbeiði fíggjað av íløgum fyri 2009 (skjal nr. 2009-2360/1), eru markaðar kr. 1.000.000,- til fyrireikingararbeiði viðv. Brúnni um Sandá, sum partur av langtíðaríløguætlan kommununar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta avsettu upphæddina á kr. 1.000.000,- til framhaldandi projektering og fyrireikingar, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 3. desember 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur á fundum viðgjørt spurningar til framhaldandi projektering av brúnni og í sambandi við fyrireikingarnar fer nevndin m.a. at mæla til, at arbeiðið hjá nevndini eisini skal fevna um vegastrekkini báðumegin sjálva brúnna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við tilmælinum í fundarfrásøgn nr. 7 (j. nr. 2006-3283/23) og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 29. apríl 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. mai 2010:** Borgarstjórin var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

Tekniski stjóri greiddi frá málinum.

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum í fundarfrásøgn nr. 7 (j. nr. 2006-3283/23) soleiðis, at arbeiðið hjá bygginevndini eisini kemur at fevna um vegastrekkini báðumegin brúnna um Sandá.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Í framhaldi av tilgongdini av projektering av brúnni, hevur bygginevndin á fundi 4. november 2010 viðgjørt spurningin um innihaldið í einum byggiprogrammi og hvør skal bjóða uppá hetta arbeiðið. Byggiprogrammið skal fevna um:

1. Stutt frágreiðing um byggimálið
2. Almenna endamálsorðing
3. Myndugleikagóðkenningar og galdandi reglugerðir
4. Stødd á brúgv ella frágreiðing um faktisk teknisk viðurskifti.
5. Tann bjóðandi skal definera kriteriið fyri design av brúnni.
6. Hædd skal verða tikin fyri samlaðari last á brúgv – herundir neyðugu lastkombinatiónir innan galdandi normum.

7. Hædd skal verða tikin fyri geotekniskum kanningum á staðnum.
8. Frágreiðing um bygging, logistik o.a. í hesum sambandi
9. Tekniskar veitingar
10. Evt. onnur útgerð
11. Tíðarætlan og kostnaðarmeting av brúnni
12. Kostnaður/tilboð fyri byggiprogrammið
13. Tíðarfreistin at gera byggiskránna er 6 vikur.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at:
1. Taka undir við uppskotinum um byggiprogram sambært fundarfrásøgn nr. 8 skjal nr. 2006-3283/29.
2. Biðja p/f LBF og EFLA h/f um at koma við tilboði upp á byggiprogram.
3. Beina málið, um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina, í býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 2. desember 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.
Levi Mørk var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

**Fíggjarnevndin 8.desember 2010:** Málið umrøtt. Verður tikið upp aftur á einum seinni fundi.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur á fundi hin 18. januar 2011 viðgjørt málið av nýggjum, og mælir til fylgjandi at leggja fyri teknisku nevnd, fíggjarnevnd og býráð.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til:
1. At umsitingin við neyðugari hjálp frá ráðgevum, ger uppskot til byggiskrá at leggja fyri bygginevndina, faknevdir og býráð innanfyri 6 vikur.
2. At byggiskráin tekur útgangsstøði í samtyktini í bygginevndini hin 4. november 2010
3. At talan skal verða um betongbrúgv
4. At arbeiðið verður boðið út í innbodnari heildararbeiðstøku millum upp til 5 heildararbeiðstakarar eftir uppskoti frá umsitingini
5. At hvør tilboðsgevari kann lata inn upp til 2 uppskot
6. At umsitingin ger uppskot til dømingarkriteriir og dómsnevnd at leggja fyri bygginevndina, faknevdir og býráð innanfyri 6 vikur.
7. At játta kr. 1,0 mió. av íløgum fyri 2010, og kr. 2,0 mió. av íløgum fyri 2011 og kr. 400.000,00 av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2011:** Samtykt at beina málið í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Tekniska nevndin 20. januar 2011:** Ein meirluti, Marin Katrina Frýdal, Sjúrður Olsen, Halla Samuelsen og Levi Mørk, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini og at beina málið í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.
Ein minniluti, Jákup Símun Simonsen, tekur undir við tilmælinum við teirri broyting, at pkt 4: *'at arbeiðið verður boðið út í innbodnari heildararbeiðstøku millum føroysk virki'.*

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. januar 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini.

**Ískoyti:**
Vísandi til pkt. 7 í tilmælinum til fíggjarnevndina hin 19. januar 2011, er av misgávum komið skeivt tal at standa um játtanina á kr. 2,0 mió. av íløgum fyri 2011. Rættað talið er kr. 2,6 mió., sambært íløguætlan kommununar fyri 2011. Tískil verður mælt til at broyta hetta sambært niðanfyristandandi tilmæli

**Tilmæli:**
Vísandi til íløguætlan kommununar fyri 2011, mæla miðfyrisitingarstjórin og tekniski stjórin fíggjarnevndini og býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd 20. januar 2011 og byggi- og býarskipanarnevndini 26. januar 2011, við hesi broyting av pkt. 7:

7. At játta kr. 1,0 mió. av íløgum fyri 2010, og kr. **2,6** mió. av íløgum fyri 2011 og kr. 400.000,00 av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

**Fíggjarnevndin 27. januar 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndini við hesi broyting av pkt. 7: At játta kr. 1,0 mió. av íløgum fyri 2010, og kr. **2,6** mió. av íløgum fyri 2011 og kr. 400.000,00 av lokaðum verkætlanum á tekniska økinum.

**Býráðið 27. januar 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram tilboð frá ráðgevum um byggiætlan til heildararbeiðstøku.

**Tilmæli:**
Vísandi til at bert eitt tilboð kom inn, mælir býarverkfrøðingurin til at taka av tilboðnum, sent við teldubrævi tann 4. Apríl 2011 frá P/F LBF áljóðandi kr. 148.000.

**Tekniska nevnd 5. apríl 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og taka av tilboðnum Frá 4. apríl 2011 frá P/f LBF áljóðandi kr. 148.000.

**Býráðið 14. apríl 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Kunnað verður um status í málinum um byggiskránna.

**Tekniska nevnd 25. august 2011:** Kim K. Hansen og Eyðbjørn Brimnes, frá Landsbyggifelagnum, kunnaðu um status í málinum um byggiskránna.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram byggiskrá, ið hevur verið viðgjørd í bygginevndini.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at taka undir við framlagda uppskotinum.

**Tekniska nevnd 22. september 2011:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram endurskoðaða byggiskrá, ið aftur hevur verið viðgjørd í bygginevndini.

**Tekniska nevnd 18. oktober 2011:** Tikið av skrá.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at taka undir við uppskotinum.

**Tekniska nevnd 8. november 2011:** Kunnað var um málið.

**Umval av býráðslimum í bygginevndina Brúgv um Sandá sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. november 2009:** Valdir vórðu Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**Býráðið 14. desember 2011:** Valdir vórðu Levi Mørk og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Nevndin skal taka støðu til útbjóðingina av arbeiðinum at bjóða upp á heildararbeiðstøku . Umsitingin kunnar annars um gongdina í málinum.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at bjóða P/F TG-Verk, P/F Articon og P/F J&K Petersens Contractors til lisitatiónina.

**Tekniska nevnd 19. apríl 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.
Harumframt mælir Jákup Símun Simonsen til at seta sum treyt, at høvuðsráðgeving verður gjørd av føroyskum virki.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram endaligt útbjóðingartilfar til støðutakan. Saman við byggiskránni verður framløgd frágreiðing frá ráðgeva um jarðfrøðiligu kanningarnar á økinum, har

brúgvin kemur at standa. Eisini verður útbjóðingartilfar til staðsetingina av rundkoyringunum báðum framlagt. Kunnað verður um niðurstøðurnar í bygginevndini.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir til at góðkenna útbjóðingartilfarið og bjóða arbeiðið út.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

Harumframt mælir Jákup Símun Simonsen til at seta sum treyt, at høvuðsráðgeving verður gjørd av føroyskum virki.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mai 2012:** Nevndin hevur ongar viðmerkingar til útbjóðingartilfarið.

**Fíggjarnevndin 31. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 31. mai 2012:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Jógvani Arge um at seta sum treyt, at høvuðsráðgeving verður gjørd av føroyskum virki.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Jan Christiansen, Vagnur Johannesen, Annfinn Brekkstein, Maria Hammer Olsen og Levi Mørk.

Greiddu ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tilfarið í sambandi við útbjóðingina til heildararbeiðstøku var boðið út 3. august 2012. Í hesum tíðarskeiði hevur ávíst samskifti verið millum umsiting og tilboðsgevarar um ymsar tekniskar detaljur í verkætlanini. Eisini hevur samskifti verið við umboð frá Landsverki og Jarðfeingi um jørðkanningar og við umboð frá friðingarmyndugleikanum. Kommunan hevur eftirfylgjandi fingið umbøn frá einum av tilboðsgevarunum um at leingja freistina at lata tilboðið inn, ið er sett til fríggjadagin 12. oktober 2012, kl. 14.00. Biðið verður um at leingja freistina við 2 vikum.

Samskifti hevur verið millum limir í bygginevndini, sum mæla til at ganga umbønini á møti.

Føroya Handverksmeistarafelag hevur eisini sent kommununi skriv, við spurningum og viðmerkingum til útbjóðingartilfarið. Umsitingin hevur gjøgnumgingið skrivið og gjørt uppskot til svarskriv, sum er sent bygginevndini til viðmerkingar.

Greitt verður frá gongdini í málinum.

**Tilmæli:**
Bygginevndin mælir teknisku nevndini til at leingja freistina, soleiðis at lisitatiónin í staðin fyri verður fríggjadagin 26. oktober 2012, kl. 14.00. Bygginevndin mælir eisini til at senda uppskotið hjá umsitingini til svarskriv til Føroya Handverksmeistarafelag.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Maria Hammer Olsen var ikki við til hetta málið.

**Fíggjarnevndin 12. desember 2012:** Útsett.

**Ískoyti:**
Í samband við gjøgnumgongdina av tilboðunum, hevur bygginevndin útvegað sær hjálp frá uttanhysis serfrøðingum frá COWI, í samband við teknisku avkláringina sambært ABT93, §3, stk 9. Tekniska avkláringin, og eftirfylgjandi spurningar til tilboðsgevararnar vístu, at munandi frávik vóru í tilboðunum í mun til minstukrøvini í byggiskránni, og at talan er í summum førum um frávik sum vilja hava fíggjarligar avleiðingar fyri byggiharran.

Á hesum grundarlagi, er mett um teknisku og løgfrøðiligu viðurskiftini, og er gjørt innanhysis notat um hesi viðurskifti, har niðurstøðan er, at frávikini eru ov stór í mun til minstukrøvini ásett í byggiskránni, og at tey nógvu frávikini og ivamálini viðføra, at ov stórur ivi stendst um samanberingargrundarlagi, til tess at tryggja eina rætta døming av tilboðunum.

Á hesum grundarlagi hevur tekniski stjórin mælt bygginevndini til, at mæla teknisku nevnd, fíggjarnevndini og býráðnum til at annulera lisitatiónina, og bjóða arbeiðið út av nýggjum við hóskandi freist, at nýggj tilboð kunnu dømast og góðkennast av býráðnum áðrenn 31. dec. 2012.

Bygginevndin hevur viðgjørt spurningin og tilmælið frá tekniska stjóranum og komin til ta niðurstøðu at taka undir við tekniska stjórnum og mæla teknisku nevnd at annulera lisitatiónina.

**Tilmæli.**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við bygginevndini.

**Tekniska nevnd 13. desember 2012:** Vísandi til tilmæli frá bygginevndini, grundað á innanhýsis upprit og frágreiðing frá umsitingini um, at ov nógv ivamál eru við innkomnu tilboðunum í mun til minstukrøvini ásett í byggiskránni og útbjóðingartilfarinum annars, samtykti nevndin at taka undir vid bygginevndini, um at mæla byráðnum til at annulera lisitatiónina, og at bjóða arbeiðið út av nýggjum til somu tilboðsgevarar, við freist til fríggjadagin 21. dec. kl. 14.00 at lata inn nýggj tilbod.

Eisini samtykti nevndin, at tilmæli frá dóms-/bygginevndini skal fyriliggja seinast 28. dec. 2012, kl. 12, at leggja fyri nevndina kl. 15.00 sama dag.

Viðv. samsýning fyri tey áður innkomnu tilboðini verður mælt til, at ongin samsyning verður goldin fyri hesi tilboðini, vísandi til at tey ikki lúka minstukrøvini í útbjóðingartreytunum. Samstundis verdur mælt til, at samsyningin fyri nýggj tilboð sum lúka minstukrøvini, verður kr. 250.000, og annars sambært ásetingunum í ABT93, §2, stk. 6.

Samstundis mælir nevndin til, at nakrar broytingar verda gjørdar í útbjóðingargrundarlagnum, herundir hesar:

Vegbanabreiddin á vegum og brúgv um Sandá verdur broytt frá 3,75m til 3,5m

1. Kravið um serstaka vernd millum koyribreyt og gongu-/súkklubreyt verdur strikað
2. Innihaldid í útsendum rættingarskrivum verður innskrivað í útbjóðingartilfarið
3. Tíðarætlanin fyri verkætlanina verður forskotin ein mánaða.

**Fíggjarnevndin 13. desember 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 13. desember 2012:** Einmælt samtykt.

Nevndarlimur hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Útsett.

**Tekniska nevnd 18. mars 2013:** Kunnað varð um málið.

**Val av býráðslimum til bygginevnd fyri Brúnna um Sandá sambært § 36 í kommunustýrislógini**

**Býráðið 26. november 2009:** Valdir vórðu Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**Býráðið 14. desember 2011:** Valdir vórðu Levi Mørk og Sjúrður Olsen.

**Býráðið 21. mars 2013:** Vald vórðu Marin Katrina Frýdal, Sjúrður Olsen og Sigrún Mohr.

**Ískoyti:**
Til tess at koma víðari við málinum, eftir at upprunaligu tilboðsgevararnir í felag valdu ikki at lata inn tilboð til lisitatiónina 27. des. 2012, má støðast takast til útboðshátt og um hvørt krøvini í byggiskránni skulu broytast, herundir vegabreidd, um longd og hædd á brúgv, um onnur loysn enn brúgv kann gerast o.s.fr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at ein politisk avgerð verður tikin um yvirskipaðu viðurskiftini um útboðshátt og hvat slag av loysn skal bjóðast út, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 15. mai 2013:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at halda fast við at eina loysn við brúgv, og at bjóða arbeiðið út í nýggjari heildararbeiðstøku millum somu tilboðsgevarar, við teimum broytingum av byggiskránni, sum samtyktar eru í býráðnum 13. des. 2012.

**Ískoyti**
Í sambandi við nýggja útbjóðing, er neyðugt at takað støðu til fíggjarlig viðurskifti í samband við samsýningar fyri innkomin tilboð.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og tekniski stjórin mæla til fylgjandi:

- Kr. 250.000 í samsýning til hvønn tilboðsgevara fyri heilt nýggj prosjektir og tilboð, sum ikki byggja á undanfarin uppskot og loysnir,
- Kr. 100.000 í samsýningin til hvønn tilboðsgevara, fyri prosjektir og tilboð, sum byggja á undanfarin uppskot og loysnir,
- Kr. 200.000 í samsýning til hvønn tilboðsgevara, fyri prosjektir og tilboð frá lisitatiínini 26. Okt. 2012, men treytað av, at tilboðsgevarin letur inn eitt ella fleiri nýggj tilboð sambært omanfyristandandi.

Harumframt verður mælt til, at treytirnar í ABT93, §2, stk. 6 eru galdandi fyri vinnandi tilboðið, og at freistin at lata inn nýggj tilboð verður sett til mikudagin 21. aug. 2013.

Somuleiðis verður mælt til, at bygginevndin og umsitingin og bygginevndin hava ein fund við tilboðsgevararnar at fáa greiðu á møguligum ivamálum í útbjóðingartilfarinum

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd hin 15. mai 2013 og við tilmælinum frá kommunustjóranum og tekniska stjóranum og at beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fundur hevur verið við teir tríggjar arbeiðstakararnar, sum áður hava bjóða uppá brúnna um Sandá. Teir vildu hava viðurskiftini um samsýning í sambandi við fyrstu lisitatiónina avgreidd, áðrenn farið verður víðari við møguligum samstarvi um tilboð uppá brúnna.Teir mettu, at ein samsýning á kr. 650.000 til hvønn var rímilig.

Í samráð við bygginevndina, hevur kommunan sent teimum uppskot um at kommunan rindar teimum samsýningina á kr. 250.000 í part til fulla og endaliga semju. Hetta er tann upphæddin sum í mesta lagið kundi rindast, sambært útboðstreytunum.

Í teldubrævið, sum er sent borgarstjóranum, frá Vinnuhúsinum hin 21. august 2013, vegna teir tríggjar arbeiðstakararnar, verður boðað frá, at tikið verður undir við samsýningini.

**Tilmæli:**
Borgarstjórin, kommunustjórin og tekniski stjórin mæla til at góðkenna uppskotið til semju.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Halla Samuelsen og Jógvan Arge, tekur undir við tilmælinum og játtar kr. 750.000,00 av konto 8175 L81003 og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 16. september 2013:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Eftir at málið um samsýning í samband við fyrstu tilboðini varð samtykt og avgreitt av býráðnum, varð samskifti um leist fyri útinning av verkætlanini tikið upp aftur við arbeiðstakararnar. Teir blivu m.a. bidnir um at siga, um teir vóru sinnaðir at gera arbeiðið í felag, ella at arbeiðið bleiv boði út. Hin 6. november 2013 boðað arbeiðstakararnir í hvør sínum skrivið frá, at teir ikki eru sinnaðir at standa saman um at útinna verkætlanina. Víst verður til upprit í málinum.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og tekniski stjórin mæla til:

1. at kommunan tekur endaliga avgerð um høvuðslinjurnar og fortreytirnar fyri útsjónd av brúnni
2. at bygginevndin og umsitingin fáa heimild at gera avtalur við ráðgevarar at gera liðugt útbjóðingartilfar
3. at brúgvin verður detailprojekterað og at verkætlanin verður boðin út, soleiðis at allir tilboðsgevarar bjóða uppá sama prosjektgrundarlag.
4. at býráðið tekur avgerð um, hvørt arbeiðið skal bjóðast út millum innbodnar arbeiðstakarar, møguliga við undangóðkenning ella um útbjóðingin skal vera almenn.
5. at býráðið tekur avgerð um, hvørt arbeiðið skal bjóðast út samla, ella um tað skal bjóðast út soleiðis, at vegir og rundkoyringar verða í einari útbjóðing, og brúgvin í eini aðrari útbjóðing.
6. at kommunan beinanvegin søkir friðingarmyndugleikarnar um prinsippiella góðkenning.

og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. november 2013:** Nevndin samtykti

1. at bygginevndin og umsitingin avtala hesi viðurskifti við ráðgevararnar
2. at taka undir við pkt. 2
3. at taka undir við pkt. 3
4. at mæla til, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión
5. at býráðið tekur støðu til samlað ella deilt útboð, tá tilboð og tíðarætlan fyriliggja frá ráðgevunum
6. at taka undir við pkt. 6

treytað av góðkenning frá teknisku nevnd og at beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Kommunan hevur móttikið tilboð uppá projektering frá tveimum ráðgevum – einum arkitekti og einum verkfrøðingi. Verkfrøðingarnir vísa á, at fyrimunur kann verða at bjóða arbeiðið út samlað, men at tað eisini kann lata seg gera at bjóða rundkoyringar og vegir út hvør sær, og at hesi arbeiði kunnu verða liðug fyrst í juni 2014. Projekteringin av brúnni kann verða liðug 15. apríl 2014.

**Tekniska nevnd 28. november 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við fíggjarnevndini viðv. pkt. 1, 2, 3 og 6.
Viðv. pkt. 4 mælir nevndin býráðnum til at bjóða arbeiðið út alment, og viðv. pkt. 5 mælir nevndin býráðnum til at bjóða arbeiðið út soleiðis, at vegir og rundkoyringar verða í einari útbjóðing, og brúgvin í eini aðrari útbjóðing.

**Býráðið 28. november 2013:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Útbjóðing av vegastubbum og rundkoyringum í sambandi við brúnna um Sandá varð hildin 20. januar 2014. Inn komu fimm tilboð, harav tilboðið frá Sp/f Andrias Berg var lægst.

<u>Tilboðini vóru hesi</u>:

| | |
|---|---|
| Andrias Berg | 9.728.856,- |
| Articon | 12.485.223,- |
| Hans Wilhelm Lürtzen | 12.494.930,- |
| TG Verk | 13.072.792,- |
| J&K Petersen | 13.662.898,- |

Ráðgevin hevur kannað tilboðini og mælir til at taka av tilboðnum frá Sp/f Andrias Berg.

Fundur í bygginevndini varð hildin 27. januar 2014, har tilboðið frá Sp/f Andrias Berg var til viðgerðar.

Bygginevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Sp/f Andrias Berg, viðvíkjandi gerð av vegastubbum og rundkoyringum við Velbastaðvegin og Reynsgøtu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini, og at heimila umsitingini at gera arbeiðstøkusáttmála við lægsta tilboðsgevarin, og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. januar 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 30. januar 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðið 30. januar 2014:** Einmælt samtykt.

**24/14** **2011-0679**

**Uppskot til skúlabygnað**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í álitinum Fólkaskúlin í Tórshavnar kommunu árini 2012-2021 verður skúlabygnaðurin í kommununi viðgjørdur. Skúlabygnaðurin í kommununi hevur avgerandi ávirkan á bæði íløgutørvin í verandi og nýggjar skúlar og á raksturin, serstakliga tímajáttanina til einstaka skúlan.

Skúlabygnaðurin hevur eisini avgerandi ávirkan á, hvussu undirvísingin kann skipast bæði í mun til lærugreinir, næmingar, lærarar osfr. Tað hevur í hesum sambandi stóran týdning, at skúlabygnaðurin er so skipaður, at hann stuðlar sum best undir undirvísingarliga virksemið og harvið mennir fakliga stigið.

Í álitinum er ein røð av tilmælum, sum fevna um skúlabygnaðin í allari kommununi, og sum byggja á ymisk atlit og fortreytir, ið mett verður hava størst týdning. Talan er um uppskot til ein samanhangandi bygnað, sum tí hevur ávirkan og avleiðingar fyri flest allar skúlarnar í kommununi. Samsvarandi uppskotinum um nýggja bygnaðinum setur uppskotið harumframt út í kortið, hvørjar íløgur skulu gerast komandi árini.

Størsta uppskotið er at byggja nýggjan Vesturskúla og í hesum sambandi niðurleggja Venjingarskúlan og Kommunuskúlan, og at Nám X verður sjálvstøðugur miðbýarskúli.

Onnur høvuðsbroyting er at skipa forskúla í øllum skúlum. Ein triðja høvuðsbroyting er, at skúlaskiftið verður at fylgja býtinum grunddeild (1.-3. fl.), miðdeild (4.-6. fl.) og hádeild (7.-9. fl.).

Í fólkaskúlalógini § 32 er ásett, at ein skúlabygnaður skal verða gjørdur fyri fólkaskúlan í kommununi. Sambært § 47, stk. 6 ger kommunustýrið uppskot um skúlabygnað og broytingar í honum, og sambært § 52, stk. 4 viðger skúlastýrið saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað og broytingar í honum. Í teimum kommunum, har tvey ella fleiri skúlastýri eru, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk at viðgera uppskot um skúlabygnað.

Álitið um nýggjan skúlabygnað deils fyri kommununa sum heild, deils fyri einstaka skúlan, verður nú at leggja fyri skúlastýrini, og settur verður arbeiðsbólkur, har kommunan og tey 11 skúlastýrini í kommununi eru umboðað. Úrslitið av hesum verður so aftur at leggja fyri nevnd og býráð.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at álitið verður at leggja fyri skúlastýrini, og at settur verður arbeiðsbólkur umboðandi øll skúlastýri og kommununa at viðgera bygnaðaruppskotið.

**Mentamálanevndin 18. november 2011:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 24. november 2011:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 18. apríl 2012:** Kunnað varð um niðurstøður frá arbeiðsbólkinum, sum hevur viðgjørt álitið um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021

**Ískoyti:**
Við støði í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingunum frá arbeiðsbólkinum umboðandi skúlastýrini, hevur annar arbeiðsbólkur nú útgreinað eitt konsept fyri nýggjum Vesturskúla (sí máltal 2012-1064). Arbeiðið er fyrsta stigið í fyrireikingunum at byggja henda skúlabygning.

Í nevndu ætlan er Vesturskúlin ein trý-sporaður skúli við forskúla og frítíðarskúla, og sostatt í samsvari við bygnaðin og skúlatilboðini, sum skotin verða upp í álitinum. Trý-sporaði Vesturskúlin er saman við ætlanini at flyta Nám X úr Eysturskúlanum høvuðsfortreyt fyri, at til ber at skipa skúlabygnaðinum fyri alla kommununa eftir uppskotinum í álitinum.

Vísandi til ætlanina at byggja Vesturskúlan (máltal 2012-1064) verður mett neyðugt við politiskari støðutakan til høvuðslinjurnar í uppskotinum til nýggja skúlabygnað fyri alla kommununa.

Hesar høvuðslinjur eru:

- At talið av sporum í høvuðsstaðarskúlunum í hádeild (7.-9. flokk) verður 14
- At Venjingarskúlin og Kommunuskúlin leggja saman í trý-sporaðan Vesturskúla
- At Skúlin á Argjahamri, Hoyvíkar skúli og Skúlin við Løgmannabreyt verða tvey-sporaðir skúlar 1.-9. flokk
- At Eysturskúlin verður tvey-sporaður 1.-6. flokk og fimm-sporaður 7.-9. flokk
- At Sankta Frans skúli verður tvey-sporaður 1.-6. flokk
- At næmingar úr Sankta Frans skúla, Nólsoyar skúla, Velbastaðar skúla, Kaldbaks skúla og Kollafjarðar skúla flyta í 7. flokk í Eysturskúlan
- At Nám X flytur úr Eysturskúlanum

Uppskotið um at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum hongur ikki saman við skúlabygnaðinum, men er mál um skipan av skúlatilboðum.

Landsstýrið skal sambært fólkaskúlalógini § 57, stk. 5 góðkenna skúlabygnað kommununnar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja uppskotið til skúlabygnað fyri alla kommununa samsvarandi høvuðslinjunum omanfyri.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið og til kunningar í fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Kunnað varð um málið

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í skrivi dagf. 19. februar 2013 boðar Mentamálaráðið frá, at Mentamálaráðið góðkennir ikki uppskotið til nýggjan skúlabygnað fyri Tórshavnar kommunu.

Í skrivinum verður víst á, at Mentamálaráðið arbeiðir við broytingum í fólkaskúlabygnaðinum, so at tímar í størri mun verða tillutaði til skúlaøki. Á henda hátt metir Mentamálaráðið, at tað ber til at tillaga fólkaskúlabygnaðin til tey ávísu økini, sum síðan sjálv gera av, í hvørjum hølum undirvíst verður.

Mentamálaráðið hevur ætlanir um at seta eina royndarskipan í verk, har tímatillutanin verður lagað eftir næmingatalinum í hvørjum árgangi. Ætlanin er framhaldandi, at kommunurnar sjálvar skulu gera av, hvørjir skúlabygningar skulu brúkast, men hetta má vera í tráð við fíggjarviðurskifti landsins, og í tráð við hvussu nógvir næmingar eru. Mentamálaráðið vil fegið samstarva við Tórshavnar kommunu viðvíkjandi skúlabygnaðinum í framtíðini og er altíð til reiðar at umrøða spurningin nærri.

Meðan omanfyri nevnda serliga snýr seg um tímajáttanina frá Mentamálaráðnum til skúlarnar, er skúlabygnaðurin eisini tengdur at íløguætlanini hjá kommununi í mun til tørv á skúlabygging og dagføring. Fundir hava verið við skúlastýri serliga í mun til støðuna hjá
Venjingarskúlanum, Tórshavnar kommunuskúla og Sankta Frans skúla.

**Mentamálanevndin 13. juni 2013:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, samtykti at fáa til vega eina verkætlanar- og tørvslýsing fyri ein miðbýarskúla og Vesturskúla og heita á býráðið um fíggjarnevndina at játta kr. 1.000.000 av kontu 4176 verkætlan L41012 Vesturskúli fyrireiking.

Ein minniluti, Jógvan Arge og Tróndur Sigurðsson, taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2013:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 26. juni 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 500.000 av konto 4176, verkætlan L41012 Vesturskúli fyrireiking, at fáa til vega eina tørvslýsing fyri ein miðbýarskúla og Vesturskúla. Umsitingin fær til vega tørvslýsingina í samráð við mentamálanevndina, ið verður at leggja fyri býráðið í seinasta lagi 15. september 2013.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 26. juni 2013.

- Ávegis tørvslýsing verður løgd fram.

**Mentamálanevndin 10. september 2013:** Málið umrøtt. Tørvslýsing verður latin nevndini til víðari viðgerð 15. september 2013.

**Ískoyti:**
Tørvslýsing við heitinum *Skúlabygnaður og skúlabygningar – Tørvslýsing miðstaðarøkið* verður løgd fram at viðgera.

**Mentamálanevndin 9. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við uppskoti 4 í tørvslýsingini, og at heita á umsitingina um at útgreina bygnað og bygging í mun til ymsu skipanirnar, kostnað, verkseting og tíðarætlan, at leggja fyri nevndina aftur skjótast.

**Mentamálanevndin 21. oktober 2013:** Útgreiningin varð løgd fram. Málið útsett til næsta fund.

**Mentamálanevndin 6. november 2013:** Útsett.

**Mentamálanevndin 10. desember 2013:** Samtykt at heita á umsitingina um tilmæli til arbeiðssetning, har arbeiðsbólkur verður settur at gera uppskot til samskipan og/ella samanlegging av Venjingarskúlanum og Kommunuskúlanum, herundir leiðsluviður-skifti, undirvísing, bygningar v.m. at leggja aftur fyri nevdina á næsta fundi.

- Uppskot til arbeiðsbólk og arbeiðssetning verður lagt fram.

**Ískoyti:**
Í sambandi við uppskotið at byggja nýggjan skúla í vesturbýnum, varð mælt til, at Venjingarskúlin og Kommunuskúlin verða lagdir saman og flyta í henda nýggja skúlan.

Við støði í, at høvuðsstaðarøkið frameftir væntast at hava 12 spor 1.-7. flokk og 13 spor 8.-9. flokk, verður talan um at lækka samlaða talið av sporum við tveimum í mun til bygnaðin í dag. Sum fortreyt fyri hesum liggur eisini ein betri gagnnýtsla av høliskapasiteti í Skúlanum á Argjahamri.

Nýggi skúlin verður tí væntandi tveysporaður 1.-7. flokk og fýrasporaður 8.-9. flokk, har tey bæði eykasporini í framhaldsdeildini eru flokkar úr Sankta Frans skúla. Harumframt skal forskúli og frítíðarskúli verða partur av bygninginum. Atlit eigur at takast til, at til ber at byggja skúlan út seinni.

Eingin endalig tíðarætlan fyriliggur fyri nýggjum skúla. Eingin endalig avgerð er heldur tikin um talið av sporum, men mett verður neyðugt at fyrireika tilgongdina at samskipa undirvísingarvirksemið hjá báðum skúlunum longu nú, herundir næmingatilgongdina, eins og at fyrireika eina bygnaðarliga samanlegging.

Settur verður tí arbeiðsbólkur at gera uppskot til samskipan og/ella samanlegging av Venjingarskúlanum og Kommunuskúlanum.

**Tilmæli:**
Arbeiðsbólkurin skal:

1. Gera uppskot til bygnaðarliga samskipan og/ella samanlegging av skúlunum báðum sum liður í ætlanini um nýggjan skúla, herundir tíðarætlan og meting um fyrimunir og vansar.

2. Gera uppskot til samskipan av øllum undirvísingarvirkseminum hjá skúlunum báðum í verandi virknu høliskørmum við denti á at savna ymsu floksstigini, og at ætlaði nýggi skúlin verður at hava tvey færri spor enn skúlarnir samlað av hava í dag, herundir tíðarætlan.

Arbeiðsbólkurin skal verða liðugur lata uppskot 2. mai 2014.

Arbeiðsbólkurin verður mannaður soleiðis:

- Eitt umboð fyri skúlaleiðsluna í Venjingarskúlanum
- Eitt umboð fyri skúlaleiðsluna í Kommunuskúlanum
- Eitt umboð fyri lærararnar í Venjingarskúlanum
- Eitt umboð fyri lærararnar í Kommunuskúlanum
- Eitt umboð fyri foreldrini í skúlastýrinum í Venjingarskúlanum
- Eitt umboð fyri foreldrini í skúlastýrinum í Kommunuskúlanum
- Eitt umboð fyri mentamáladeildina, sum samstundis verður skrivari

- Trivnaðarstjórin, sum samstundis er formaður

**Mentamálanevndin 8. januar 2014:** Samtykt at taka undir við arbeiðssetninginum.

**Fíggjarnevndin 22. januar 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 30. januar 2014:** Málið beint í mentamálanevndina.

**FUNDUR LOKIN KL. 20:40**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Elin Lindenskov | Bjørghild Djurhuus |
| Helena Dam á Neystabø | Sigrún Mohr | Tróndur Sigurdsson |
| Rúni Djurhuus | Bogi Andresen | Annfinn Brekkstein |
| Sjúrður Olsen | Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal |
| | Heðin Mortensen | |